
Veðrið




Fimm – daga-forsøgnin frá DMI


Petur Skeel Jacobsen, veðurfrøðingur, greiðir frá um veðrið



Veðrið í dag:
Stívt andøvsgul upp í hvassan vind av landsynningi, támut veður og regn av og á. Hitin millum 5 og 8 stig.



Veðrið leygardagin:
Fyrst stívt andøvsgul upp í hvassan vind av eystri, skýggjað og lýtt veður, men út á dagin hækkar hann upp í landnyrðing og veksur vindin til skrið. Tað klárar í og hitin fellur niður í 3 til 5 stig.



Veðrið sunnudagin, mánadagin og týsdagin:
Strúkur í vindi upp í skrið av landnyrðingi og ælingur, partvís vátaslettingur ella kavi. Hitin verður millum 2 og 5 stig. Seint mánadagin ella út á týsdagin lækkar hann niður í eystan og tað verður aftur eitt sindur lýggjari.

Scilly Oyggja kapprógvingin



Sum kunnugt vann »Vestmenningur« Ólavsøkusteypið hjá AMERADA HESS bólkinum og harvið høvið at fara niður til Scilly Oyggjarnar og luttaka í sonevndu **World Championship Gig Racing** í mai 1998.

Vestmenningar eru nú tilmeldaðir. Stórur áhugi er fyri hesari kapping og yvir 60 bátar fara at luttaka.

Í faru viku vóru Hálvdan Hálvdansen og Jan Jóhannesen fyri »Vestmenning« og umboð fyri Amerada Hess niðri í Cornwall og á Scilly Oyggjunum. Har kunnaðu teir seg um hesa rógving og hvussu hon fer fram og verður fyriskipað.

Eisini varð keyptur ein bátur, sum vestmenningar skulu hava at íðka við. Hann kemur til Føroya í næstum.

Til sjálvan róðurin fara vestmenningar at læna ein bát á Scilly Oyggjunum.


Wreck of Zanzibar
er heitið á einari sera vælumtóktari enskari barnabók, sum fer fram á Scilly Oyggjunum. Lívið á Scilly Oyggjunum í gomlum døgum hevur ikki verið ólíkt tí føroyska gerandisdegnum og verður henda bókin tískil nú týdd til føroyskt og fer Skúlabókagrunnurin at geva hana út í mai 98 um somu tíð sum kapprógvingin verður.




Eitt hátrýst yvir landnyrðingspartin av Grønlandi fer komandi dagarnar móti Norður-Skandinaviu, meðan fleiri djúp lágtrýst fara frá New Foundlandi móti Suður-Grønlandi og síðani móti Suður-Skandinaviu og Mið-Europu



Teir fyrstu dagarnar verður tí ikki stór broyting í veðrinum í Føroyum, men í vikuskiftinum rekur eitt skifti kaldari luft móti Føroyum av landnyrðingi.



Hitalagið mált frá 26./11. kl 06^{00}–27./11. kl 06^{00}. Hitin í gjár: 7,6°C
Minsti hiti máldur í nov.: -7,2° Hægsti hiti máldur í nov.: 14,2°



Avfallið: 0,7 mm – mált frá 26./11. kl 06^{00}–27./11. kl 06^{00}
Avfallið higartil í november: 118,7 mm

Hitalagið kring knøttin

Illulisat	+6
Nuuk	+6
Qaqortoq	+5
Ammassalik	6
Saint John's	+1
Halifax	6
Reykjavík	7
Seyðisfjørður	5
Tórshavn	7
Lerwick	6
Aberdeen	7
London	11
Tromsø	0
Bergen	2
Oslo	0
Stokkhólm	0
Keypmannahavn	0
Helsinki	–
Moskva	0
Berlin	1
Warzawa	0
Kiev	5
Bukarest	–
Paris	11
Madrid	10
Róm	16
Malorca	16
Athen	–
Malta	–
Tunis	19
Beijing	2
New Dehli	14
Bangkok	34
Jakarta	28
Sydney	35
New York	11
Miami	25
Los Angeles	15
Meksikobyur	–
Panama	24
La Paz	17
Rio de Janeiro	–
Buenos Aires	24

Kelda: DMI

Vestfalskyrrindi

24. november: Mánin longst frá jørðini
30. november: Tendring

	Suðuroyar-/Vágafirði fp	sp	Vestmanna-sundi fp	sp	Nólsoyar-firði fp	sp	Haraldssundi/ Leirvíksfirði fp	sp	Skúvoyarfirði/ Skopunarfirði fp	sp	Hestfirði/ Sundalagnum fp	sp
28. nov.	0505	1726	0705	1926	0320	1541	0520	1741	0405	1626	0420	1641
29. nov.	0548	1811	0834	2057	0449	1712	0649	1912	0534	1757	0549	1812
30. nov.	0644	1857	0834	2057	0449	1712	0649	1912	0534	1757	0549	1812
1. des.	0720	1944	0920	2144	0535	1759	0735	1959	0620	1844	0635	1859

Alt innanhýsis telefonarbeiðið verður gjørt

- Kaðalar verða lagdir
- Telefonstikk sett upp
- Góðar telefonir í øllum príslegum
- Vekslarar
- Tráðleys umstilling ímillum hús

Ringið til fakmannin!

Fa. Eyðun Egholm
Teleútgerð, tænasta og ráðgeving
Fjalsgøta 13 • 100 Tórshavn •
Tlf. 14567 • Fax. 19670

Orginal bosal útstoyt

p/f Esmar Simonsen
Kambsdalur
FR-530 Fuglafjørður
Tlf 44405 Fax 44629

STRANDA BIO
★ TLF. 48160 ★
Telefonsvararin stendur altið til



Frigg jad. 28.11. kl. 20^{30}
Leygard. 29.11. kl. 20^{30}
Sunnud. 30.11. kl. 20^{30}

Komandi filmur:
12. desember: **Karla Kanin Bio 2**
12. desember: **Air Force One**
26. desember: **G. I. Jane**

Hugnalig cafeteria